# Álitisfólkabólkar, innanhýsisbólkar og grunnar

Føroya Pedagogfelag skal fevna breitt, og hevur tí skipað arbeiðið við ymiskum ráðum, arbeiðsbólkum og grunnum.

**Álitisfólkabólkar**

- endamál og innihald.

Álitisfólkabólkarnir vórðu skipaðir við tí endamáli, at styrkja álitisfólkaskipanina, álitisfólkini og felagið.

Styrkin kemur av, at álitisfólk nú hava møguleikan at hitta onnur álitisfólk, skapa eitt netverk, umrøða og fáa góð ráð viðvíkjandi trupulleikum, ið kunnu stinga seg upp.

Tað er givið, at summi álitisfólk hava fleiri royndir enn onnur, og fyri tað nýggja álitisfólkið er tað ein fyrimunur at kunna leita sær royndir.

Gevið gætur - álitisfólkabólkarnir skulu ikki málsviðgera ella viðgera ítøkilig mál ella viðurskifti. Álitisfólk hava eisini eina loyalitetsskyldu mótvegis arbeiðsplássinum hjá sær. Tað ber tó til at viðgera óítøkilig ella "dulnevnd" mál, um endamálið er at fáa vegleiðing ella ráðgeving.

Álitisfólkabólkarnir hava eisini eina uppgávu, ið er at kunna felagið um, hvat rørir seg úti á arbeiðsøkjunum. Á henda hátt fær felagið betur fylgt við og fyrireikað seg til framtíðar avbjóðingar.